# Hava góðar vónir um framtíðina




**FISKIVINNA** Um ein mánaða er eitt ár liðið, síðan flakavirkið á Kósini í Klaksvík læt uppaftur við nýggjum eigarum

Vilmund Jacobsen

Bjartskygni ráddi í Klaksvík, tá stóra flakavirkið Kósin í Klaksvík læt uppaftur í endanum av november mánaða í fjør, eftir at virksemið tá hevði ligið stilt í fleiri mánaðir.

Fríðin Ziskason var settur virkisleiðari á Kósini, og tað var ein bjartskygdur maður, sum tá tók um stýrisvølin og setti sær fyri at fáa virkið uppaftur at koyra, og raksturin at hanga saman.

Nú 11 mánaðir eru umlidnir, er Fríðin framvegis bjartskygdur.

– Tað er eingin ivi í mínari sál um, at vit fara at fáa hetta at bera til. Hanga vit í, so fer tað eisini at bera til.

Sjálvur vil virkisleiðarin ikki siga nakað ítøkiligt um fíggjarligu gongdina higartil, men heldur, at hon er á eini leið.

### Rávørutrot

– Hjá okkum eins og hjá øðrum, sum luttaka í fiskaframleiðslu, er ov lítið av ráfiski. Upsaveiðan svíkur, og lítil fiskur kemur upp á land.

Fríðin Ziskason kundi hugsað sær, at fiskaarbeiði á Kósini var enn meiri støðugt, men soleiðis, sum ráfiskatilgongdin er, detta dagar burtur ímillum, har eingin framleiðsla er.

Á Kósini, sum bæði hevur flakaframleiðslu og saltfiskaframleiðslu, arbeiða millum 60 og 80 fólk.

– Talið av arbeiðsfólki veldst um, hvat vit gera, og hvørji fiskasløg vit hava, sigur hann.

Fríðin Ziskason sigur, at meðan upsin verður skorin til flak, fara eitt nú toskur, longa og brosma til saltingar.

### Við í kapping

Seinastu tíðina hava fleiri partrolarar, sum eru heimahoyrandi aðrastaðni, við jøvnum millumbilum landað veiðina í Klaksvík.

– Vit hava keypt fisk hjá eitt nú vestmannatrolarunum, Vestmenningi og Fram og hjá Vesturtúgvu og Grønanesi, sigur virkisleiðari á Kósini.

Sum skilst, hava prísirnir á upsa onkran dagin ligið uppi á 9 krónum fyri kilo, og tað er rættiligа góður upsaprísur.

– Men trupulleikar eru at fáa nóg mikið av fiski til dagsins framleiðslu.

Fríðin Ziskason sigur, at hóast eitt virki í dag vildi givið einar 9 krónur fyri kilo fyri 200 tons av upsa, so er ikki vist, at tú kortini fært fatur á hesum fiskinum.

– Tað er ov lítið av upsa á marknaðinum, leggur virkisleiðarin á Kósini í Klaksvík aftrat.

*vilmund@sosialurin.fo*

***- Hóast eitt virki í dag vildi givið einar 9 krónur fyri kilo fyri 200 tons av upsa, so er ikki vist, at tú kortini fært fatur á hesum fiskinum, sigur Fríðin Ziskason, virkisleiðari á Kósini***

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Bakur og Stelkur (

**FISKIVINNA** Tað er meiri undantakið, at partrolarar gera ein góðan túr, soleiðis sum veiðan er í løtuni

Vilmund Jacobsen

Í morgin landar landingarmiðstøðin Kongshavn partrolararnar Stelk og Bak, sum hava verið úti síðan 15. oktober. Hóast túrurin er úti, hava skipini bert sløk 120.000 pund av upsa, sum er vánalig veiða.

Á landingarmiðstøðini Kongshavn vænta tey eisini onnur skip hesa vikuna, tí flestu partrolararnir, sum plaga at landa í Saltangará, vóru inni og fóru útaftur fyri júst einari viku síðan.

– Tað er meiri undantakið, at skipini gera ein góðan túr, siga tey á landingarmiðstøðini Kongshavn.

Árið 2009 var eitt sera gott ár hjá til nøgd hjá partrol-